


# Skjótt koma Maersk og BP við superpallinum

**Jan Müller**

25.05.2014 - 14:20

Oljan.fo

Fyri hálvum øðrum ári síðani noyddist Dong at sleppa ætlanini at fáa olju upp úr Svane-leiðini í Norðsjónum. Orsøkin var, at tað var eingin útgerð, sum var egnað til at bora har, tí verandi útgerð kláraði ikki hitan og trýstið á so stórum dýpi.

Í BP hava tey roknað seg fram til, at avmarkingarnar í teirri tøkni, sum er tøk í dag, forða felagnum at fáa fatur á millum 10 og 20 milliardum tunnum av olju.

Tí hevur bretska felagið arbeitt við at menna útgerð, sum kann bora á serliga djúpum vatni. Tað er gjørt í samstarvi við danska Maersk Drilling, og nú eru feløgini komin so mikið áleiðis, at tey hava boðað frá, at verkætlanin verður liðug síðst í hesum árinum ella tíðliga næsta ár.

Tan nýggi pallurin fer at tola munandi meiri hita og munandi størri trýst enn teir boripallar, sum vit kenna í dag. Maersk Drilling hevur longu verið í sambandi við

skipasmiðjur í Suðurkorea og Singapore um at byggja tann fyrsta superpallin, og sum skilst fer hann at kosta einar 600 milliónir dollarar ella einar 3,5 milliardir krónur.

Tann nýggi superpallurin er millum annað væl egnaður til boringar í Miðjarðarhavinum, úti fyri Vesturafrika, í brasilksum sjógvi og í Meksikoflógvanum.

Sum nevnt slepti Dong sínum boriætlanum á Svane-leiðini. Felagið hevur sagt, at gassið har er á millum 5,5 og 6,0 kilometra dýpi, har trýstið er millum 1.200 og 1.300 bar og hitin næstan 200 stig.

Danska Orkustýrið hevur mett, at meiri enn 100 milliardir rúmmetrar av gassi eru í Svane-leiðini. Tað er nóg mikið til at nøkta tann danska tørvin í eini 25 - 30 ár.